# Takkarkvøða

Hjartaliga takki eg fyri heilsanir, blómur og uppringingar á fimmti ára føðingardegi mínum 13. februar. Eisini takki eg øllum tykkum, sum stukka inn á gólvið 17. februar og gjørdu dagin hugnaligan fyri okkum øll.

Gleðiligar páskir!

**Uni Næs, sóknarprestur, Fuglafjørður**

# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, ið gjørdu mær 90 ára føðingardagin 20. februar so hugnaligan.

Takk fyri gávur, blómur, fjarrit, uppringingar, heilsanir og tøkk til tykkum øll, ið komu inn á gólvið heima og í Missiónshúsinum á Viðareiði.

Ein hjartans tøkk til øll tykkum, sum hjálptu til.

Eisini ynski eg øllum einar gleðiligar páskir.

**Heilsan**
**Fía Sørensen, Hvannasund**

## Dagurin í morgin

**4. apríl. Ambrosius**, deyður 397. Biskupur í Milano, verður nevndur sum ein av kirkjufedrunum.

# Tøkk

Vit takka fyri sýnda samkenslu tá ið kæra kona,
mamma, vermamma og omma

**Lilly Øster**

andaðist og varð jarðað.

Takk til Jónsvein prest fyri góð orð í kapellinum og kirkjuni.
Takk til kirkjutænara, sangarar og øll tykkum, ið hjálptu til í sambandi við ervið.
Ein serstøk tøkk til starvsfólk og búfólk á sambýlinum í Hvalba.
Takk fyri kransar, blómur og til øll tykkum, ið fylgdu henni til hennera seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Johan, Jens, Terje og Martin**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara elskaði pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Poul Poulsen, (Pollaba)**

andaðist á Norðoya Røktarheimi 31. mars, 90 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týsdagin 3. apríl kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Betesda mikudagin 4. apríl kl. 14.

*Familjunnar vegna*
**Páll, Elsa, Frida og Malena**

*Tey, ið vilja minnast pápa, kunnu lata eina gávu til Akurin.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kinna úr Dímun**, fødd Mørk, ættað úr Sandvík, búsitandi í Tórshavn, andaðist leygardagin 31. marts, 76 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju mikudagin klokkan 13.00

Tey, ið vilja minnast Kinnu, kunnu lata Havnar Kirkju eina gávu, konta í peningastovnunum
--

**Regin Dahl** andaðist í Keypmannahavn 29. mars,88 ára gamal. Kórseting verður í Vartov kirkju í Keypmannahavn týsdagin 10. apríl klokkan 11.

KAUPTHING BANK



*Vika 14*
*2007*

# Partabrøv ikki heilt sloppin enn

MARKNAÐARRÁK

Partabrøv flest alla staðni eru komin væl fyri seg síðan tey lækkaðu fyri góðum mánað síðani. Sostatt sær út til, at hetta bert var ein lítil korrektión. Í mars hækkaðu alheims partabrøv stívliga 2%. Síðan 5. mars er Evropa hækkað 5,2%, USA 1,3% og Japan er óbroytt, alt uppgjørt í evrum. Sum sæst á myndini eru partabrøv nú næstan á sama stigi, sum tá lækkingin byrjaði síðst í februar. Her hava tey ligið seinastu vikuna. Ein lítil lækking á 2%-3% sum í novembur kann ikki útihýsast, áðrenn vit kunnu siga at hendan korrektiónin í marknaðinum er av. Nú nógv halda frí um páskini verður handlað minni enn vanligt, og hetta kann hava við sær, at kursrørslur upp ella niður kunnu gerast størri enn vanligt.

### USA hækkað tollin

Dollarin liggur enn og damlar niðan fyri 5,60 krónur. Hann kostar nú kr. 5,57. Tíðindi bórust í farnu viku um, at USA hevur hækkað tollin á útvaldum vørum úr Kina. Kina kann svara aftur við at selja burtur av teirra stóru goymslu av amerikonskum lánsbrøvum, og harvið óbeinleiðis elva til bæði hækkandi rentur í USA og ein veikari dollara. Gjaldoyramarknaðurin hevur ikki enn tikið hesi tíðindi til sín av álvara.

### Lánsbrævarentur støðugar

Lánsbrævarenturnar hava verið rættiliga støðugar hesa farnu vikuna. 10-ára rentan er 4,09%. Renturnar fara væntandi framvegis at fylgja partabrævamarknaðinum neyvt.

### Hesa vikuna

Orsakað av páskunum er hendan vikan stutt her hjá okkum, men tað steðgar ikki gongdini á fíggjarmarknaðunum. Flestu marknaðir eru opnir hós- og fríggjadagin, og tað koma ein rúgva av lyklatølum, ið kunnu flyta marknaðirnar. Størstur verður áhugin fyri amerikonsku arbeiðsmarknaðarfrágreiðingini fyri mars. Um hon vísir hampuliga framgongd, kann hetta stuðla partabrøvum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 557,44 | -0,3% | ↓ |
| JPY | 4,73 | 0,0% | → |
| GBP | 1.102,44 | 0,2% | ↑ |
| NOK | 91,31 | -0,6% | ↓ |
| SEK | 79,43 | -0,8% | ↓ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,45 | -0,2% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 131,42 | -0,4% | ↓ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 695,00 | 11,9% | ↑ |
| KB Trygg Eurostoxx | 108,16 | 0,4% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*